# Málráðið skal løggilda stavseting og stavrað

**STAVSETING** Føroyingar skriva í dag eftir stavsetingarháttinum hjá V.U. Hammershaimb, og stavraðið byggir á hendan stavsetingarhátt. Men hvørki stavseting ella stavrað eru nakrantíð staðfest við lóg. Tey hava bara fingið gildi av siðvenju og orsakað av átøkum hjá persónum og feløgum. Nýggja málráðið, ið Mentamálaráðið fer at seta, fær til uppgávu at løggilda bæði stavseting og stavrað

Uni Arge

Tað tók sína tíð, men betri seint enn ongantíð, munnu tey hugsa, sum í 2007 skrivaðu álitið Málmørk um støðuna hjá føroyskum máli.

Í álitinum varð skotið upp at seta niður eitt breitt málráð, ið skal taka sær av øllum spurningum um føroyskt og eisini fáa myndugleika at løggilda eitt nú føroyska stavseting. Rumblið um stavraðið í løgtinginum endaði við, at limir í løgtingsins mentanarnevnd snaraðu málinum til at snúgva seg um hetta málráðið, og nú hevur Mentamálaráðið so sent feløgum og stovnum uppskotið um nýggja málráðið til hoyringar.

Sambært uppskotinum fer nýggja málráðið at fáa víðar heimildir, nógv víðari heimildir enn tann ráðgevandi myndugleika, sum Føroyska Málnevndin hevur í dag. Málráðið fær heimild til at gera av málsligar spurningar, sum tað stendur í uppskotinum. Ráðið skal gera av spurningar um stavseting og stavrað, og ein tann fyrsta uppgávan, ið ráðið fær, verður at gera eina føroyska stavsetingarorðabók. Málráðið fær tí veruligt vald og ikki bara tann vegleiðandi leiklut, sum verandi málnevnd hevur.

### Skriftnormurin

Í uppskotinum hjá Mentamálaráðnum verður víst á, at ein ávísur skriftnormur hevur ment seg, síðan V. U. Hammershaimb í 1846 gjørdi føroyska skriftmálið. Normurin hjá Hammershaimb er vaksin fram hjá einstøkum persónum ella feløgum, ið hava verið virkin á mentanarøkinum, og hann hevur fingið útbreiðslu gjøgnum eitt nú skúlabøkur, orðabøkur, bløð, miðlar, fagrar bókmentir, yrkisbøkur og annað. Málmyndugleikin hevur so tikið undir við norminum og styðjað upp undir hann.

Í viðmerkinginum til uppskotið verður staðfest:

»Skrivihátturin er vorðin til sum siðvenja og sum málpolitisk átøk, ið mentafólk hava framt. Tað merkir, at stavsetingin er ongantíð ásett við lóg. Tað einasta átakið, sum tingið hevur ásett, var tá ið Skúlakommisjónin í 1954 sendi boð út til allar skúlar í landinum um at fylgja nøkrum rættskrivingarreglum, sum ein løgtingsnevnd var komin til. Nevndin æt Rættskrivingarnevnd Føroya Løgtings. Sostatt vórðu rættskrivingarreglurnar broyttar hetta árið, og tað merkti óbeinleiðis, at myndugleikin staðfesti Hammershaimbs-normin.«

Í viðmerkingunum verður sagt, at í dag verður tosað um at løggilda latínska stavraðið, men so verður lagt aftrat, at »enn er føroyska stavraðið ikki løggilt, tað byggir á siðvenju og verandi skriftnorm.« Hetta vísir í veruleikanum, hví ósemjur um føroyskt so lætt kunnu stinga seg upp, og hví so trupult er at loysa tær trætur, ið áhaldandi eru. Skriftmálið er ein siðvenja og ikki nakar fastlagdur veruleiki, og tey, sum eru ímóti galdandi siðvenju, kunnu so royna at broyta hana, meðan hini sum frægast halda ímóti.

Tá málráðið so kemur, verður ein og sami normur ætlandi løggildur.

### Meirilutin ræður

Áhugavert er tí, hvussu Mentamálaráðið ætlar at seta málráðið saman. Fer ráðið at vera ført fyri at semjast um stavseting, stavrað og aðrar málspurningar? Mentamálaráðið ætlar, at fimtan limir skulu veljast í málaráðið, sum so velur eina starvsnevnd. Í málráðið skulu ið hvussu er limir fyri Fróðskaparsetur Føroya, Føroyamálsdeildina, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Móðurmálslærarafelag Føroya, Málfelagið, Kringvarp Føroya, LISA, Javnstøðunevndina, Rithøvundafelagið, Føroysk Miðlafólk, Føroya Ungdómsráð, kommunufeløgini, Vitan og Mentamálaráðið.

Sjálvt málráðið skal hava fund tvær ferðir um árið. Starvsnevndin, ið verður mannað við formanninum og næstformanninum og trimum limum aftrat úr málráðnum, hevur fund eftir tørvi, tó í minsta lagi eina ferð um mánaðin. Á sínum fundum tekur starvsnevndin støðu til málspurningar av øllum slag. Ein áhugaverd upplýsing í uppskotinum um sjálvt málráðið er, at avgerðir, ið ráðið tekur, verða tiknar við vanligum meiriluta. Hetta merkir, at ein tepur meiriluti kann gera av avgerandi málspurningar, sum ein stórur minniluti er ímóti.

Føroyska Málnevndin hevur leingi víst á, at hon við verandi orku er ikki før fyri at fylgja við teirri málsligu menningini í samfelagnum. Nevndin hevur hjá Mentamálaráðnum gjørt vart við, at føroyski málheimurin hevur ment seg ómetaliga nógv og fevnir um støðugt fleiri økir, eitt nú ungdómsmentan, samskiftismentan, tónleikamentan, ítróttarmentan og ferðavinnu. Samstundis økist málsliga ávirkanin uttaneftir sera nógv hvønn dag, og málnevndin vil tí hava sínar førleikar styrktar munandi. Tað verða teir so við tí heilt nýggja málráðnum, ið kemur í staðin fyri málnevndina.

